# Álit II

# í

**løgtingsmáli nr. 149/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)** (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 10. juni 2020, og eftir 1. viðgerð tann 12. juni 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 16. og 17. juni 2020.

Nevndin legði fram álit tann 19. juni 2020, og við 2. viðgerð tann 19. juni 2020 varð málið beint aftur í nevnd.

Nevndin hevur síðan viðgjørt málið á fundi tann 22. juni 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Bjørt Samuelsen, Henrik Old, Bjarni Hammer og Bjarni Kárason Petersen) hevur hesar viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin biður um tvingsilsheimild í mun til matstovur og skeinkistøð fram til 31. mars næsta ár.

Meirilutin metir ikki, at heimildin til at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19 er í samsvari við gott lógarsmíð og heldur ikki, at ásetingin er hóskandi í matstovulógini. Ei heldur metir meirilutin tað vera klókt at veita úrvaldum vinnubólki trygd fyri stuðli, uttan at hetta hevur verið viðgjørt sum partur av hjálparpakkunum.

Tvingsilsheimildin, biðið verður um, fevnir einans um ein avmarkaðan part av samfelagnum – tað virksemi, ið er fevnt av matstovulógini. Hon røkkur ikki aðrastaðni í samfelagnum, sum til fótbólstdystir, festivalar, stevnur, møtir ella alt annað, har nógv fólk kemur tætt saman.

Smittuvandin kann verða stórur allastaðni, har nógv fólk savnast. Verður landið stongt niður aftur vegna koronu, so verður tørvur á víðari átøkum enn at steingja ella avmarka barrir og matstovur. At trygd verður veitt fyri endurgjaldi, líknandi hjálparpakka 3, samsvarandi ynski frá 8 skeinkingarstøðum í Havn, broytir ikki uppá tann veruleikan.

Meirilutin heldur tað vera rætt at viðgera spurningin um endurgjald/stuðul, men vísir á, at hetta sjálvandi má gerast í einum uppskoti fyri seg, sum partur av teimum hjálparpakkum, Løgtingið samtykkir. Uppskotið skal fevna um alla vinnu, ið kann verða rakt av stongslinum.

Tað er hvørki rætt ella rímiligt at áseta nýggja stuðulsskipan/trygd fyri úrvalda vinnugrein í einum broytingaruppskoti til framhaldi av 2. viðgerð. Tað vil siga, uttan, at Løgtingið hevur havt møguleikan at viðgera partin um fíggjarligt endurgjald til hesa vinnu.

Farsóttarnevndin, ið er fremsta smittuverjuráðgevingin hjá landsstýrinum, hevur ikki mælt til at gera broytingar í matstovulógini. Tá Farsóttarnevndin hevur víst á, at tað kundið verið hóskandi ella hent við tvingsilsamboðum fyri at forða smittuspjaðing, hevur talan verið um generella lóggávu, so sum at herða epidemilóggávuna.

IVI SÁDDUR UM, HVØRT LÓGIN FÆR VIRKNAÐ
Nú málið kom aftur í nevnd, er skriv komið frá Danska Heilsu- og Eldramálaráðnum, ið er av teirri fatan, at forðing fyri smittuspjaðing er danskt málsøki, og at Løgtingið harvið ikki hevur neyðugu lógarheimildina til at gera umrøddu ásetingarnar í matstovulógini.
Hetta samsvarar við tað, sum løgfrøðiliga ráðgevingin hjá løgmanni og hjá Løgtinginum hava víst á - at ásetingarnar áttu at verið gjørdar í epidemilógini. Tey seta spurnartekin við, um lógarheimildin í praksis fær gildi.

**Bjørt Samuelsen og Bjarni Kárason Petersen** hava harumframt hesar viðmerkingar:
Undirritaðu halda ikki, at nøkur forðing eigur at vera fyri, at føroyingar sjálvir áseta reglur í mun til at forða fyri smittuspjaðing. Hetta fer eisini at skapa presedens soleiðis, at tað verður lættari at lóggeva á teimum økjum, vit meta tørv vera á, uttan mun til, um hesi løgfrøðiliga verða mett sum "ikki-yvirtikin" øki. Tí partinum eru vit samd í.

Annars vísa undirritaðu til viðmerkingarnar í fyrra álitinum, har seks av sjey limum í Vinnunevndini mæltu frá at samtykkja uppskotið.

Meirilutin tekur ikki undir við málinum, og mælir Løgtingum frá at samtykkja uppskotið

**Minnilutin** (Christian Andreasen, Johan Dahl og Beinir Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:
Umboð fyri matstovur og skeinkistøð hava havt ynski um, at broytingar verða gjørdar í mun til at seta hesa heimild í gildi.

Minnilutin heldur, at heimildin eigur at avmarkast í tíð, soleiðis at heimildin fer úr gildi 31. august 2020, tá hjálparpakkarnir annars fara úr gildi.

Um tað verður neyðugt við fleiri heimildum, eigur landsstýrismaðurin at fáa sær røttu heimildarnar til vegar, soleiðis at heimildin ikki bert umfatar útskeinkingarstøð ella matarstøð. Heimildin eigur at vera meira generell, og geva heimild at taka neyðug stig, har nógv fólk savnast, eitt nú til fótbóltsdystir, skrúðgongur og annars størri fólkamongdir.

Tað er ikki nøktandi, at spurningurin um lógarheimildina hjá landsstýrinum er ógreiður, og henda spurning eigur landsstýrismaðurin at fáa greiðu á, áðrenn møguligt nýtt uppskot um slíka heimild aftur verður lagt fyri Løgtingið.

Samsvarandi hesum setir minnilutin fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** Í § 1 verður í § 18, stk. 2 aftan á 1. pkt. sum nýggj pkt. sett:

"Avger landsstýrismaðurin at avmarka vanligu afturlatingartíðirnar til áðrenn kl. 02.00 ella at minka mest loyvda tal av gestum, hevur viðkomandi fyritøka rætt til stuðul eftir somu reglum, sum eru ásettar í løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19. Stuðulstíðarskeiðið byrjar, tá ið avgerð sambært 1. pkt. fær virknað og endar 31. august 2020."

**2.** Í § 2 verður "31. mars 2021" broytt til: "31. august 2020".

**Serligar viðmerkingar**
Tað er týdningarmikið at undirstrika, at heimildin at avmarka vanligu afturlatingartíðirnar bert verður nýtt í førum, har mett verður, at tað er ein ítøkiligur og stórur smittuvandi. Broytingaruppskotið hevur við sær, at tekur landsstýrismaðurin avgerð um, at afturlatingartíðin skal avmarkast til áðrenn kl. 02.00, so hava viðkomandi fyritøkur rætt til stuðul sambært teimum reglum, sum Løgtingið hevur samtykt viðvíkjandi stuðli til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19.

Tað er nærum ógjørligt at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum, men mett verður ikki, at talan er um stórar upphæddir. Møguligur stuðul verður goldin sambært somu reglum, sum eru galdandi í løgtingslóg nr. 97 frá 23. juni 2020 um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19. Rætturin til stuðul er galdandi til 31. august 2020, tá ásetingin í § 1 fer úr gildi sambært § 2.

Við hesum broytingum tekur minnilutin undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 24. juni 2020**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Johan Dahl<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Henrik Old | Bjarni Kárason Petersen | Beinir Johannesen |
| | Christian Andreasen | |